# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Wheel-Kit:

## Tað skal vera bíligt at finna

TÍÐINDASKRIV

Hugskotið aftan fyri nýggja felagið Wheel-Kit, sum nú fer undir at leiga GPS'arar út til føroyingar, er at tað skal vera bíligt at finna hjá teimum, ið ætla sær at ferðast í bili í Evropa. Nú ber til at leiga sær mest framkomnu útgerðina til at finna veg út í hvønn krók á meginlandinum.

Kort eru fløkjaslig at koyra eftir. Og tú finnur onki kort, sum bæði vísir vegin úr Hanstholm til París og beinir teg beint á eitt nú Disney World ella Versaille slottið.

Mentaðgerateirnýggjastu og bestu GPS'ararnir harafturímóti. Tað er lætt og einfalt at finna vegin til býir, gøtur og adressur. Og við GPS'aranum veitst tú altíð við fullari vissu, hvar tú sjálvur ert staddur.

Bæði tekstur og tala eru á donskum.

Einasti vansi er, at teir nýggjastu og bestu GPS'ararnir eru dýrir at keypa. Her er tað Wheel-Kit kemur inn í myndina við einum tilboði, ið sparir kundunum nógvar túsund krónur, ið teir so kunnu brúka at forsøta sær túrin á meginlandinum við. Meira fæst at vita um kostnað við at venda sær til Wheel-Kit. Fyri tey, ið ferðast við Nørrönu er serprísur, so ikki verður goldið fyri dagarnar, ið bilurin er umborð á ferjuni.

Tað er bil- og dekkverkstaðið Rag-Vag, ið saman við øðrum hevur tikið stig til at stovna Wheel-Kit. Um undirtøkan fyri útleigu av GPS'arum verður góð, fer felagið at víðka tænastuna við at leiga út takboksir, barnastólar og køliboksir. Hoyr nærri á tel. 595600.




Tórshavnar alfrøði:

## Konfirmantar í apríl 1904



Hesir vóru konfirmantarnir, ið blivu fermdir í Havnar kirkju sunnudagin 10. apríl 1904: Petrine Sofie Elisabeth Hansen, Anna Kathrine Herborg Hansen, Anna Kathrine Mouritsen, Anne Elisabeth Juline Simonsen, Juliane Marie Sivertsen, Christian Carl Debess, Niclas Pauli Hansen, Ole Sofus Hansen, Valdemar Frands Jacobsen Rein, Hjalmar Lorents Kragesten, Jens Venningsted Mortensen og Magnus Edvard Samuelsen, hesi vóru øll úr Havn.

Síðani komu: Hansine Marie Sofie Jakobsen (Koltur), Thomine Jakobine Mathilde Jakobsen (Kaldbak), Valborg Simonsen (Velbastaður), Albertine Ludvigka Simonsen (Norðradalur), Niels Johan Juel Arge (Argir), Daniel Johan Frederik Niclasen (Velbastaður). Eisini vóru tað tveir konfirmantar av Tvøroyri, hesir gingu í millumskúla í Havn, teir vóru: Peter Emil Mortensen og Edvard Esbern Mortensen (seinnri Mitens).

Tann einasta konfirmantin vit kenna, er hann sum stendur aftast t.v., hann er Edvard Esbern Mortensen (Mitens) av Tvøroyri. Sum lesararnir síggja, er myndin ikki nakað at reypa av, myndin er úr einum av bókunum hjá Edvard Mitens. Um nakar veit um upprunaligu myndina, er viðkomandi hjartaliga vælkomin at ringja til Birgar Johannessen á tlf. 314647 ella 214647. Eisini fara vit at heita á lesararnar um at hjálpa okkum við at fáa røttu nøvnini á røttu persónarnar.

Mynd: Úr bókini »Eg minnist II« eftir Edw. Mitens

Operation Christmas Child:

## Ein lítil gáva kann hava stóra ávirkan

TÍÐINDASKRIV

Í sambandi skógvaeskjutiltakið hjá Operation Christmas Child er takkarskriv komið til øll í Føroyum sum hava verið við í hesum tiltakið og stuðla tí á ymiskan hátt.

Heimsinnsavningin av skógvaeskjum aftur í ár meira enn 7 milliónir eskjur, sum vórðu savnaðar inn í 11 londum og býttar út í meiri enn 90 tjóðum til børn, sum tosa fleiri enn 70 tungumál.

Gávurnar verða givnar børnum uttan mun til etniska bakgrund, politiska áskoðan, trúaráskoðan og uttan krøv til tey persónliga, familjur ella samfelag teirra.

Franklin Graham, leiðari av Samaritan's Purse, segði: "Operation Christmas Child hevði ikki borið til uttan alla sjálvbodnu hjálpina at pakka eskjurnar, fíggjarligar gávur og bøn. Vit takka tykkum hjartaliga fyri allan stuðul tykkara. Uttan tykkara skógvaeskjur hetta árið høvdu yvir eina millión børn bert havt droymt um eina jólagávu".

Franklin Graham fór til Suður Afrika saman við Bill og Gloriu Gaither at fyrireika eina Operation Christmas Child Homecoming video konsert har. Tey góvu hundraðtals eskjur til børn, sum eru rakt av HIV/AIDS og liggja á sjúkrahúsi uttan vón um nakran kæran at vera um tey.

Síðani 1990 hevur Operation Christmas Child savnað umleið 46 milliónir skógvaeskjur og sent tær til børn í meiri enn 120 ymiskum londum.

